# Skúlastýrið fyri skúlan  í Eysturkommunu

## Fundur týsdagin 5. okt.  2017

Staður: Leirvík Tíð:  16.00 til 18.00

Møtt á fundi: Ruth N. Sevdal, Ove Heinesen, Gudny Langgard, Jórun Eið Johannesen, Katrin I Gregersen og skrivari Fríðfinnur Johnsson.

Ikki møtt: Hjalti Dalheim

Skrá:

1  Undirskriva fundarfrágreiðing

2  Leiðslan kunnar

3  Støddfrøðibólkar í miðdeildini

4  Dururin í Leirvíkar skúla

5 Ymiskt

ad 1 Fundarfrágreiðingin var undirskrivað

ad 2 Skúlastjórin kunnaði um gongdina í skúlanum. Næmingatalið er vaksandi. Nú ganga 273 næmingar í skúlanum,  tað er tað mesta nakrantíð.

ad 3 Skúlastjórin kunnaði um, hví farið er til at hava bólkar í støddfrøði heldur enn bara flokkar. Leiðslan er samd um, at hetta er ein góð skipan.

ad 4 Dururin í skúlanum í Leirvík er eitt afturvendandi mál. Vónandi verður hetta málið loyst í komandi fíggjarári.

ad 5 Tosað var um evnið til fundin millum skúlastýrið og starvsfólkini. Heitt var á Ruth, um at kanna, um møguligt er at fáa onkran at greiða frá um Ugeskemarevolutionen.

Eisini bleiv tosað um, um til ber at gera eina skipan innan serøkið saman við Fuglafjarðar kommunu. Her bleiv serliga hugað um, hvussu vit lættari hjálpa børnum við størri- og smærri avbjóðingum.